


*Tey stóru útlendsku oljufeløgini, sum hava áhuga fyri føroyska økinum, hava longu gjørt síni egnu kort yvir hetta nýggja „oljuøkið". Hetta er nýggjasta kortið hjá oljufelagnum Phillips yvir bæði Norðsjógvin og alt Føroyar-Hetlandsøkið ella kent undir felagsheitinum Atlantsmótið. Vit síggja, at oljufelagið hevur longu fingið allar blokkarnar á føroyskum øki við á sítt kort. Kelda Phillips.*

*Oljumyndugleikarnir taka týðandi stig víðari:*

# Biðja nú oljufeløg koma við ynskjum um blokkar á føroyska økinum

***Føroyar eru nú farnar inn í eitt nýtt og áhugavert skeið í sambandi við eina møguliga komandi oljuvinnu. Oljuráðleggingarnevndin er nú komin við einum ítøkiligum útspæli til útlendsku oljufeløgini til eitt komandi útbjóðingarumfar í føroyskum øki.***

JAN MÜLLER

Hevur áhugin fyri føroysku undirgrundini verið stórur áður, so er hann tað ikki minni nú. Orsøkin er tann, at føroysku oljumyndugleikarnir nú hava sent innbjóðing til oljufeløgini um at tilmæla (nominera) blokkar á føroyska økinum í sambandi við fyrsta føroyska útbjóðingarumfarið, ið væntandi verður lýst í seinnu helvt av 1997.

Í brævinum, sum fór til tey mongu oljufeløgini, ið higartil hava sýnt føroyska økinum áhuga (her er møguliga talan um eini 25-30 feløg, blaðm.) verður víst á, at Oljuráðleggingarnevndin, sum stendur undir landsstýrinum, ynskir at vita, hvørji øki oljufeløgini halda eru áhugaverd, og hvørji øki (blokkar) feløgini kundu hugsa sær at bjóða uppá, tá fyrsta útbjóðingarumfarið verður um um eitt ár.

Økið kring Føroyar, sum hertyri varð býtt upp í blokkar og sum oljufeløgini nú kunnu siga sína hugsan um, er tann designeraði føroyski landgrunnurin innan fyri 200 fjórðinga markið.

**Markið spøkir framvegis**

Ráðleggingarnevndin ætlar við hesum at vera væl fyrireikað og í góðari tíð við tilrættaleggingini av eini komandi útbjóðing. Í hesum sambandi inngongur eisini spurningurin um ásetan av einum undirgrundarmarki millum Føroyar og Hetland.

Víðari verður sagt, at um marknatrætan er loyst, áðrenn fyrsta útbjóðingarumfarið verður, so verða eisini øki, sum liggja uppat markinum, helst við í uppskotinum frá Ráðleggingarnevndini til fyrsta umfarið.

Men er marknamálið ikki loyst, so verður uppskotið til útbjóðing ikki at fevna um blokkar, sum verða mettir at vera umtátaðir av ósemjuni.

Í brævinum til oljufeløgini stendur, at feløgini skulu gera vart við um økini (blokkarnir), sum tey ynskja at kanna, eru 1) sera áhugaverd ella 2) áhugaverd.

Eisini ynskir nevndin stutt at fáa at vita orsøkin til, at feløgini velja júst teir blokkar tey gera.

Feløgini skulu svara Oljufyrisitingini áðrenn 5. desember á middegi.

## Sjúkravikarur til Gøtu skúla

**Tá ongin umsókn kom inn til seinastu lýsingina, verður hervið søkt av nýggjum eftir sjúkravikari til Gøtu Skúla at taka við sum skjótast fyri skúlaárið 1996/97.**

Sjúkravikarur verður boðsendur til arbeiðis teir dagar onkur lærari hevur fráfall.

**Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi týsdagin 15. okt. 1996.**

**Gøtu Skúlanevnd**
Telefon 41012 Fax 41874 FR-510 Gøtu